## Andstøðan skal biðja um umbering

Í Grønlandi krevur tingbólkurin hjá Atassut, at andstøðan skal biðja Landstingið og landsstýrismannin í fiskivinnumálum, Finn Karlsen, um umbering. Í síðstu viku legði andstøðan fram uppskot um misálit á landsstýrismannin, tí hon vildi vera við, at hann hevði sagt ósatt í Landstinginum. Uppskotið fall. Atassut sigur, at andstøðan visti, at uppskotið fór at fella, og tí eigur hon at biðja um umbering fyri at hava misbrúkt tíðina hjá Landstinginum.



## Úr Spania til Grønlands

Grønlendska ferða- og vinnuráðið og ferðaskrivstovan Arctic Adventure hava júst verið við á ferðavinnuframsýningum í Madrid og Barcelona, og tey vænta sær nógv burturúr. Altsamt fleiri sponsk ferðafólk leita sær til Grønlands, og talið er fleirfaldað tey seinastu árini. Niels Feerup hjá ferða- og vinnuráðnum sigur við KNR, at um nøkur heilt fá ár verða tey sponsku ferðafólkini í Grønlandi líka mong í tali sum bretar og týskarar.



Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum, fekk heiðurin at skera bandið við einum snotiliga prýddum grindaknívi og taka Hovstunnilin alment í nýtslu. Tað er Oyvindur Brimnes, stjóri á Landsverki, sum heldur bandinum



Heilt nógv fólk var samankomið í tunlinum, tá ið hann varð tikin alment í nýtslu

# Snøggasti tunnil í landinum tikin í brúk

**Leygardagin var Hovstunnilin tikin í brúk og dagurin kundi ikki verið betri valdur**

HOVSTUNNILIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tann, koyrdi eftir fjøllunum í Suðuroy leygardagin slapp at merkja á egnum kroppi, hvussu neyðugt tað var at gera tunnil ímillum Øravík og Hov.

Tað var niðurstøðan hjá nógvum, nú illa saknaði Hovstunnilin varð tikin í nýtslu seinnapartin leygardagin.

Sipað varð til, at á tí krókuta og smala vegnum um Hovsegg, var bæði kavsvart í mjørka, regn og avbera vánaligt sýnið leygardagin, so bilarnir á gomlu høvuðsferðsluæðrini ímillum syðru og norðaru helvt í Suðuroy, mátti ganga við sniglaferð.

Tað var Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum, sum fekk heiðurin at skera snórin og taka tunnilin alment í nýtslu, men tann, sum var fyrstur at koyra ígjøgnum hann, var 85 ára gamli, Poul Midjord í Hovi, sum hevði Løgmann við sína lið í bilinum.

Og hetta hevur uttan iva verið ein heilt serlig kensla hjá honum, tí fyri 49 árum síðani var hann eisini tann fyrsti at koyra eftir vegnum um Hovsegg, sum tá var nýgjørdur og sum tá eisini var eitt veldugt frambrot tá á døgum.

Men at tunnilin eisini er kærkomin, skilst eisini, tá ið Bjarni Djurholm upplýsti, at Hovsvegurin er tað vegastrekkið í landinum, har tað eru hend eina flest ferðsluóhapp eftir bilatalinum, sum koyra eftir vegnum.

Men sum borgarstjórin í Hovi, Delmar Tausen segði, at hóast nógv ferðsluóhapp á Hovsvegnum hava verið ógvuslig, har bilar mangan eru bóltaðir runt upp til fleiri ferðir í brattlendinum, hevur ongin latið lív í nøkrum av tilburðunum.

- Vónandi kunnu vit eisini um 50 ár líta aftur um bak og siga, at her hevur ongin latið lív í ferðsluni í nýggja Hovsvegnum og í tunlinum.

Hetta segði hann í sambandi við, at summi fólk vístiá, at nýggi Hovsvegurin er so snøggur, slættur og breiður, at tað kann verða freistandi at trýsta á spidaran.

### Snøggasti tunnil í landinum

Tað vóru eisini fleiri sum høvdu á munni, at hetta var snøggasti tunnilin í landinum.

Og at talan er um valaverk, gekk sjón fyri søgn fyri hjá teimum mongu, sum koyrdu, súkklaðu, runnu ella gingu ígjøgnum hann í dag.

Hann er allur klæddur innan við styrktum betongi at forða fyri at steinar dettá á vegin og hann er serliga víður og sostatt góður hjá stórum bilum at koyra ígjøgnum.

Men tunnilin er eisini serligur við tað, at hann er tann fyrsti í landinum, har tað ber til at hoyra allar tríggjar útvarpsrásirnar, Rás 2, Útvarpið, og Lindina.

Tað er ikki bara gjørt fyri at gera koyritúrin hugnaligari, men eisini fyri trygdina, tí í neyðstøðu, kann politiið fáa boð til bilførarar ígjøgnum eina av rásunum.

So hyggjuráðini hjá teimum, sum koyra ígjøgnum tunnilin, er altíð at lurta eftir einari av rásunum.

Annars eru neyðtelefonir og ljós í tunlinum.

Tá ið tunnilin varð tikin í nýtslu, var alment hátíðarhald í gistingarhúsinum í Øravík, har hundraðtals suðuroyingar vóru komnir saman at fáa sær ein kaffimunn, kransakaku og frukt og at lurta eftir røðum frá Bjarna Djurholm, landsstýrismanni í vinnumálum, Delmari Tausen, borgarstjóra í Hovi og tingmonnunum fyri Suðuroy, Hendrik Old, Hergeir Nielsen og Johan Dahl.

Teir fegnaðist allir um at tunnilin varð komin og teir vónaðu, at tunnilin elvdi til, at Hovstunnilin fer at gera farleiðina ímillum syðru og norðaru helvt so góða og skjóta, at tað fer at binda oynna meiri saman og fer at elva til meiri samstarv í oynni.

Sum onkur førdi fram, í hugaheiminum á mongum, hevur Hovsegg staðið mestsum sum eitt sálarligt mark ímillum syðru og norðaru helvt í Suðuroy.

Leygarkvøldið helt tunnilshátíðarhaldið fram á Tvøroyri, har handlarnir høvdu tilboð og tiltøk, har konsert var í pubbini hjá Thomsen og tunnilsdansur var í Klubbanum og tað var nógv fólk í býnum.

Hovstunnilin er 2.435 metrar langur og er 10 metrar breiður og hevur kostað 150 milliónir at gera.